FAERPORT II

Dagfesting 12.12.2025

Skriv í samband við viðgerð av uppskoti til løgtingslóg um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum – Faerport II

Í sambandi við, at løgtingið og fíggjarnevndin í løtuni viðgera uppskot um at játta pening til ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum og møguligt gerðarrættarmál hevur Faerport II hesar viðmerkingar.

Fyrst skal undirstrikast, at alt arbeiðið, sum ráðgevaratoymið í Faerport II hevur gjørt, er gjørt samsvarandi avtalum við Landsverk. Tað, at samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er farin langt upp um uppruna metingar, og verkætlanin nú av onkrum verður skýrd at vera farin av sporinum og ein byggigøla o.a., er ikki nakað Faerport II kennist við ella hevur havt ávirkan á. Munandi broytingar eru gjørdar av byggiharra leypandi. T.d er bygningurin vaksin frá 10.000 m^2 til 15-16.000 m^2, tað er komin ein kjallari inn umframt ymiskt annað, og hetta hevur sjálvsagt gjørt, at uppruna kostnaðurin ikki helt.

Vit meta tó, at tað er týdningarmikið, at partarnir halda seg til substansin í júst hesum málinum sum er, at H-bygningurin lekur, og hetta er sjálvsagt ikki nøktandi. Okkara viðmerkingar niðanfyri snúgva seg tískil einans um lekarnar í fasaduni.

Glas/alu-facadusystemið, sum bleiv projekterað av Faerport II, er væl roynt í Føroyum við væleydnaðum úrsliti.

Glas/alu-facadusystemið, sum bleiv projekterað av Faerport II, er ikki brúkt. Ístaðin valdi høvuðsarbeiðstakarin eina aðra líknandi loysn. Tað er nakað sum ein arbeiðstakari hevur rætt til. Tó hevur hann ábyrgdina av at valda loysnin er eins góð sum tann fyriskrivaða. Tað var sostatt ábyrgdin hjá høvuðsarbeiðstakaranum at tryggja, at valda alternativa glas/alu-facadu loysnin livdi upp til somu krøv sum tann av Faerport II projekteraða loysnin.

Gjørd er ein “sýn og skøn” meting av einum óheftum sýnsmanni, har allir partar hava fingið høvi at at luttaka, viðmerkja og fáa innlit í, og komið er til ta niðurstøðu, at kostnaðurin fyri at gera gera ábøturnar og umvælingarnar liggur um 14,25 mió. kr. Tað undrar okkum tí nú, at Landverk metir, at kostnaðurin er 32,8 mió. Kr. Hvussu LV er komið til ein kostnað á 32,8 mió. kr. vita vit ikki.

Samanumtøka

Faerport II staðfestir, at arbeiðið at projektera H-bygningin er gjørt samsvarandi avtalum við Landsverk, og at lekaproblematikkurin snýr seg um eina alternativa glas/alu-facaduloysn, sum høvuðsarbeiðstakarin valdi at nýta, í staðin fyri ta projekteraðu loysnina til H-bygningin. Ábyrgdin fyri, at henda alternativa loysn livir upp til somu krøv sum tað sum er projekterað, liggur hjá høvuðsarbeiðstakaranum.

Ein óheft sýn og skøn-meting vísir ein kostnað fyru umvælingina á umleið 14,25 mió. kr. Faerport II hevur ikki innlit í grundarlagið fyri, at Landsverk metir kostnaðin at vera 32,8 mió. kr.